# Løgreglan steðgaði limousinuni og tók pláturnar

**Hummer Limousinan hjá byin.fo stendur nú í Gøtudali uttan nummarplátur. Hóast hvørki góðkenning, avgjøld ella trygging vóru í lagi, høvdu eigararnir leigað hana út**

LØGREGLUTÍÐINI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Her síggja vit Hummer limousinuna við Shellstøðina í Gøtudali, eftir at løgreglan klipti nummarpláturnar sunnunáttina*

Sunnumorgunin varð Hummer limousinan hjá byin.fo steðgað av løgregluni í Gøtudali. Hóast limousinan hevur verið í Føroyum í góðar tvær vikur, hava ánararnir ikki skrásett hana í landinum, og hon koyrdi við týskum nummarplátum.

Løgreglan fekk boðini um at taka pláturnar av limousinuni frá Akstovuni. Hetta tí hon var flutt inn í landið uttan um Toll- og Skattstovuna og Aktstovuna. Hetta merkir, at hon hvørki var góðkend, tryggjað ella rindaði vegskatt ella onnur avgjøld.

Av Løgreglustøðini í Havn verður sagt, at limousinan var leigað út, tá hon varð steðgað.

Kanningar verða nú gjørdar í málinum fyri at plassera ábyrgdina.

Ein bilførari koyrdi limousinuna, men tað er ikki greitt, um tað er hann, ið verður ábyrgdaður, ella um ábyrgdin liggur hjá teimum, ið hava givið honum boð um at koyra, verður sagt av Løgreglustøðini.

Av Akstovuni verður sagt, karmurin fyri revsing í málum av hesum slag er hefti ella fongsul upp til 2 ár, sambært §25 í løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakførum v. m.

## Fær plátur í morgin

**Rúni Djurhuus, eigari av hummerlimousinuni, sigur, at stóri bilurin fær plátur á í morgin, og at hann annars ikki visti av, at reglurnar vóru soleiðis**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Rúni Djurhuus, eigarin av hummerlimousinuni, hevur ikki tær stóru viðmerkingarnar til, at stóri og dýri bilurin hjá teimum í dag stendur í Gøtudali og hevur staðið har uttan plátur síðani sunnumorgunin.

Greitt er, at ein persónur ikki hevur loyvi at koyra í Føroyum við útlendskum plátum, og at tollviðurskiftini í hesum førinum ikki vóru avgreidd. Vit ringdu tí til Rúna Djurhuus og spurdu, um hann ikki var greiðir um, at reglurnar vóru soleiðis háttaðar, at teir ikki høvdu loyvi at koyra bilin.

– Nei, tað visti eg ikki, var hansara stutta svar.

Hann var sum heild ikki sinnaður at gera tær stóru viðmerkingarnar til málið, men segði tó, at stóri bilur teirra fær plátur í morgin.

## Ársins heiðursløn ir í Miðlahúsinum hósdagin

miðlahúsið
í Vágsbotni

Hósdagin 22. februar verða latnar heiðursløn ir til ársins mann og ársins kvinnu, og haraftrat verður latin ársins kjakvirðisløn.

Tiltakið verður í Miðlahúsinum klokkan 16.00 og eru øll vælkomin til hátíðarhaldið.

Tvær dómsnevndir hava gjørt av, hvør skal fáa hesar heiðursløn ir hesaferð.




FØROYA BANKI
Føroya Banki stuðlar tiltakinum

MIÐLAHÚSIÐ · TÓRSGØTA 1 · BOKS 76 · FO-110 TÓRSHAVN · POST@SOSIALURIN.FO